


# Smálutirnir eiga stóran leiklut

**Ólavsøkuaftan er møguleiki hjá øllum manningum at bjarga róðrarárinum, og skal tað eydnast, so er neyðugt, at hvør smálutur situr, sum hann skal**

*Eysturoyingur liggur fremstur og man roknast sum FM favoritt hjá 10 mannaførunum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tróndur Arge**

Ólavsøkuaftan verður punktum sett fyri hesum róðrarárinum. Tá er tað síðsti møguleikin hjá teimum, sum hava stríðst og kempað síðani eina ferð í vetur, at heysta fruktina av stóru íløguni.

Allir rógvararnir hava eitt brennandi ynski um at vinna á Ólavsøku. Eingin vil vinna FM uttan eisini at vinna á Ólavsøku. At verða meistari og samstundis at vinna á Ólavsøku kennist sum meistaraheiti við serligari sloyfu.

Hjá teimum, sum tað ikki hevur gingið soleiðis hjá í teimum seks undanfarnu FM róðrunum, sum tað varð vónað og roknað við, tá ið fyrstu tøkini vórðu tikin á Norðoyastevnu, er ólavsøkuróðurin eyka møguleiki. Nú ber til at seta glæsiligt punktum og harvið eisini kanska at kveikja undir hugin eisini næsta ár at seta seg við árarnar eftir strævnan vetur í rógvimaskinunum.

Tað er altíð trýst á kappróðrarfólkunum, tá ið tey bíða eftir startskotinum. Men trýstið er neyvan nakrantíð størri, enn tað er tað ólavsøkuaftan.

### Spenningurin og smálutirnir

Páll Fangi við monnum og Teistin við gentum í barnaróðrinum hava vunnið allar róðrarnar og hava harvið tryggjað sær FM heitið, og tað hevur Erla Kongsdóttir við kvinnum eisini. Í hinum róðrunum er tað framvegis FM spenningur, og allir rógvararnir vita, at tað kunnu vera heilt smáir lutir, sum kunnu gera av, um talan verður um sigur og fagnað, ella um talan verður um tap og vónbrot.

Spurningurin er, um alt umborð riggar, sum tað skal: Halda homlubondini, tá ið rimmar fyrstu tøkini verða tikin, og halda árarnar, tá ið tað í allar fyrstu tøkunum stendur meiri á teimum, enn tað ger í restini av róðrinum.

Serliga á Ólavsøku, har teinurin er so stuttur, ræður tað um at fáa góðan start. Nú er róðrarárið so mikið nógv liðið, at stýrimenninir eiga at hava gott tak á at leggja kósina rætta. Men so er tað taktikkurin. Hvussu leingi skulu teir taka bekktøk, hvussu langur skal lunnaróðurin vera, og skulu eyka bekktøk takast, tá ið báturin nærkast ytra endanum á Molanum.

Eyðvitað er alt sovorðið avrátt frammanundan. Men hetta verður vent og snarað fleiri ferðir, tá ið taktikkurin verður lagdur. Og ein annar spurningur er, um tað skal avráðast at skifta taktikk undir róðrinum, um tað vísir seg, at tað, sum frammanundan var avrátt, ikki hevur borið ta støðuna við sær, sum tað varð roknað við.

Grundvenjingin frá jólum og út á várið kennist ofta sum pína. Ólavsøkuaftan er møguleiki hjá øllum at fáa avkast burtur úr stóru og tíðarkrevjandi íløguni. Optimala avkastið er at koma fyrstur á mál á Ólavsøku og at verða meistari. Hjá øllum teimum, sum árið ikki hevur borið FM heitið við sær, ber tað til at bjarga íløguni við sigri á Ólavsøku.

Á startmálinum undir Argjahøvda er fokus á startinum, á detaljunum, á taktikkinum og á endamálinum undir Skipafelagnum. At hoyra áskoðarafjøldina koyra á sínar manningar tykist bera við sær, at áratøkini muna uppaftur meiri hjá summum. Hjá áskoðarunum kennist tað sum serligur leiklutur at bera sínar manningar fram.

Hóast vinnararnir eru fáir og taparanir nógvir, so livir vónin í øllum teimum, sum taka lut og teimum, sum halda við og taka á við einstøku manningunum. Tað er hetta, sum ger, at tað eisini í ár verður spennandi at fylgja við í kappróðrinum á Ólavsøku.

Ólavsøkan er punktum fyri róðrarárið, og smálutirnir kunnu hava stóran leiklut.

Góðan ólavsøkuróður!